# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tilbúgving og ábyrgd

Í Degi og viku í gjárkvøldið var sera áhugavert innslag um føroysku tilbúgvingina. Í innslagnum gjørdi leiðarin fyri sløkkiliðnum í Tórshavn vart við, at vit í Føroyum onga samlaða lóggávu hava um tilbúgving. Víst var á, at eitt nú sjóskaðin við Flesjarnar í fjør, tá russiskur trolari rendi á land og seinni sakk, avdúkaði brek við føroyskari tilbúgving. Tað tykist sum trupulleikarnir eru fleiri, tá stór óhapp og vanlukkur henda. Talan er um trupulleikar við samskipan, samskifti, tilfeingi og framum alt ivaspuringurin hvør, ið hevur evstu ábyrgd.

Hetta, at spurningurin um evstu ábyrgd á vanlukkustaðnum og evstu yvirskipaðu ábyrgdina, er ein sera álvarsamur spuriningur, sum myndugleikarnir nú eiga at fyrihalda seg til. Tað er einki at ivast í, at vit hava sera dugnaligt, djarvt bjargingarfólk á sjógvi og landi, tá vanlukka hendir, ella tá skip koma í havsneyð. Alt tað vit vita um er talan um menn og kvinnur, sum sýna stórt áræði og leggja sera nógv fyri, enntá seta lívið í váða, til tess at koma neyðstøddum til hjálpar. Hetta er galdandi fyri øll tey, sum hava til arbeiðis at veita hjálp, eitt nú manningarnar hjá Vaktar- og bjargingartænastuni, sløkkiliðsmenn, tey, sum manna sjúkrabilarnar og sjúkrahúsini. Hetta er eisini galdandi fyri øll tey, sum sjálvboðin taka lut í bjargingararbeiði, eitt nú limirnir í bjargingarfeløgunum. Samfelagið hevur nógv at takka hesum pørtum fyri, og vit høvdu mangan verið illa stødd uttan hesi dugnaligu, djørvu og beinasomu fólk.

Tað kann tí ikki góðtakast, at arbeiðið og avrikið hjá øllum hesum verður darvað av vantandi samskipan og iva um evstu ábyrgd. Tað ber ikki til, at hesin vantandi liður í versta føri møguliga skal ganga út yvir neyðstødd fólk og kosta materielt tap. Tað tykist, sum alt tað verkliga í sambandi við stórar vanlukkur, virkar væl, meðan ein ávísur ivi er um evsta fyriskipandi liðið. Tað er sostatt ivi um, tann politiska partin av okkara tilbúgving, og man hetta eisini vera ein orsøk til, at atfinningar og ivamál av og á stinga seg upp í kjalarvørrinum á stórum vanlukkum á sjógvi og landi. Hetta ber í longdini ikki til, sum greitt varð víst á í nevndu tíðindasending. Her mugu skapast púra greiðar linjur og tryggir karmar. Avvarandi myndugleikar eiga tí alt fyri eitt at taka neyðug stig til at fáa til vega lóggávu, ið ásetur evstu ábyrgd av stórum og smáum bjargingartiltøkum á sjógvi og landi. Henda lóggáva skal samstundis tryggja neyðturviligt tilfeingi og tryggja, at hetta tilfeingi, tað verið seg fólk ella útgerð, verður gagnnýtt til fulnar.

**Sosialurin**

## Námsfrøðingar, tillukku við teim 11,2 í miðal

**MAUD WANG HANSEN**
Námsfrøðingur



Seinastu 20 árini hava vit í Føroyum kunnað nomið okkum útbúgving sum námsfrøðingar.

Hóast tað eru 18 ár síðan henda uppruna, eru lesiætlanirnar enn tær somu.

Tað sigur seg sjálvt, at ein útbúgving á hesum støði, sum setur so stór krøv til fakliga búning og umskiftiligheit, má endurskoðast við jøvnum millumbilum. Vit liva í dag í einum modernaðum vitanarsamfelagi, har fólk ganga meira í skúla enn nakrantíð, og har ung og eldri nema sær víðari útbúgvingar, tí tey vilja virka á skilagóðan hátt.

At fáa góðan karakter í samband við eina próvtøku er gott, og tað vekjur eina góða kenslu, tá tú veit, at hetta hevur tú stríðst fyri í fleiri ár, against all odds.

Ein og hvør hevur brúk fyri einum herðaklappi, og tað fáa tit nýklektu námsfrøðingar hervið frá mær, eitt hjartaligt stórt tillukku við frálíka próvúrslitinum og góða eydnu í tykkara framtíðaryrki. Eg havi havt ta gleði, at arbeitt saman við tykkum á Føroya Fólkaháskúla, og longu har vístu tit stóran áhuga fyri at læra og arbeiða. Vit góðum treysti loystu tit felags uppgávur eins og tit sum einstaklingar virkaðu við góðum sjálvsáliti. Eg vóni hervið, at námsfrøðiliga økið við tykkum, fær eitt positivt lyft, sum tørvur er á.

Gamal uppalingarsiður var ikki at rósa ov nógv og ikki at rósa meðan tann, tú rósti, hoyrdi tað.

Hetta hevur eftir mínari meting bert elvt til undirlutakenslur og verið ein trúðarjáttan til Jantulógina.

Um rektarin á Pedagogskúlanum (Læraraskúlanum) heldur, at næmingarnir, sum júst hava fingið prógv frá hesum skúla, hava gjørt sítt besta, so átti tað at komið fram í greinini í Dimmu 12. feruar, og tað haldi eg ikki hevur eydnast nóg væl.

Um hesin sami rektari heldur, at lesiætlanir og kunngerðir eru ov gamlar og ótíðarhóskandi, so haldi eg, at tað átti at verið ein áheitan til politisku skipanina, heldur enn ein væntandi gleðisrómur til tykkum, sum hava gjøgnumført útbúgvingina undir givnum treytum, við so sera góðum úrsliti.

At umsøkjarar til pedagogútbúgvingina hava ein miðalkarakter upp á langt yvir 9, tá tey søkja inn á hesa útbúgving, er eitt tekin í sjálvum sær um, at vit hava eitt ómetaliga gott tilfeingi í okkara landi.

Tí er tað upp á tíðina, at vit fáa umskipað pedagogútbúgvingina eftir tilmæli frá arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt eitt frálíkt álit um hesa nýggju útbúgving. Henda ætlan gongur út uppá at savna fleiri útbúgvingar í einum lærdum skúla, har tær virka á bachelor støði. Seinastu próvtølini frá pedagognæmingunum vísa, at hetta eru vit meira enn klár til.

Eisini eiga vit at geva møguleika fyri einari miðvísari útbúving í námsfrøði, so hjálparfólk kunnu nema sær vitan og útbúgving.

Menniskju eru ymiskt og arbeiðsuppgávurnar eru ymiskar, so vit eiga at tillaga útbúgvingina eftir hesum veruleika. Ein yvurakademisering skapar ikki betri úrslit í dagliga arbeiðnum, men gevur møguleika fyri, at loysa nýggjar uppgávur, og vit hava tørv á at loysa nýggjar uppgávur. Vit hava m. a. tørv á hagtølum og til hetta krevst útbúgving í vísindaástøði, sum er grundalagið undir einari bachelorútbúgving. Vit hava sanniliga eisini tørv á vitan um tað vanliga menniskja, tí fyri at skilja tað sum víkir frá, mást tú kenna tað sum er sokallað vanligt ella grundleggjandi. Tíðirnar skifta og modernaða samfelagið setur stór krøv til hvønn einstakan av okkum, og hesa uppgávu eru vit før fyri at loysa, men vit mugu krevja høskandi umstøður at útbúgva okkum og at virka undir.

## Ein millumbylgjusendara á Eystnesi er helst besta loysnin

**PETUR JACOBSEN**



Eystnes er sera væl egnað til ein millumbylgjasendara, tí tað er í passaligari hædd, lætt at koma til, er mitt á fastlandinum, tætt við sterkstreymsveiting.

Alt hettar ger eisini raksturin munandi bíligari og lættari, beinleiðis sýn er við Tórshavn, haðani stýringin og signalið skal koma frá, og er uppitíðin á sendistøðini hervið tryggjað eisini við totalt streymslit.

Alt eftir hvussu langt vit vilja hava ein millumbylgjusendara at røkka og hvussu nógv vit vilja gjalda eru her nøkur uppskot.

Um vit bert vilja røkka føroyskt land og sjóøki er ein 12KW sendari loysnin.

Vilja vit røkka longur og gjalda meira er ein 25KW sendari loysnin.

Tað sum vit fáa mest burturúr sammett við núverandi sendara er ein 50KW sendari.

**Tað er rættiliga stórur prísmunur:**
12KW kostar umleið kr. 400.000,-
25KW kostar umleið kr. 800.000,-
50KW kostar umleið kr. 1.100.000,-

Afturat hesum koma útreislur til instalatión, hús, mastur/antennir, neyðstreymsveiting og eitt petti av veg út á Eystnes, sammett við úreislurnar av at umvæla og tilpassa støðina á Akrabergi er helst javnvág í.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.